SKJAL 1

Effo/Vindrøkt
Óðinshædd 3
Postsmoga 3098
FO-110 Tórshavn

SEV

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

Tórshavn. 9. november 2018

Góðan dagin Janus Thomsen, stjóri /Jóhan í Niðristovu, stjóri.

Víst verður til fundin á SEV, hin 16. august 2018, har tit báðir luttóku fyri Effo og Vindrøkt, og har undirritaðu nevndarformaður og stjóri luttóku fyri SEV. Takkað verður fyri kunningina um samstarvið tykkara millum, sum bleiv kunngjørt seinni sama dag. Á fundinum settu tit fram spurning um samstarv við SEV viðvíkjandi vindmylluútbygging í Hoyvíkshaganum, og umrøddu vit hetta leysliga á fundinum. Tit førdu fram, at um hetta samstarvið kom í lag, kundi tað viðføra eina umsókn til myndugleikan sambært § 5, stk 3 í elveitingarlógini um útbygging av einari vindmyllulund í Hoyvíkshaganum.

Hin 20. august 2018 ringdi Bjarni Arnason, stjóri hjá Numo tykkara vegna til Boga Bendtsen, deildarstjóra hjá SEV við einum uppskoti til leist fyri nevnda samstarv. Hann nevndi, at uppskot tykkara er, at tit eiga 50 % av felagnum, og SEV eigur hini 50 %'ini, og at partarnir gera ein part-eigarasáttmála, sum regulerar viðurskiftini millum báðar eigararnar.

Hin 12. oktober 2018 var undirritaði stjóri á SEV á fundi við Árna Rasmussen, nevndarformann í Effo og Janus Thomsen, stjóra í Effo, har spurt var, um SEV kundi lata vera við at bjóða, um ein § 5, stk. 3 umsókn um útbygging av einari vindmyllulund í Hoyvíkshaganum bleiv latin myndugleikanum. Undirritaði stjóri á SEV svaraði, at SEV vildi viðgera og svara spurninginum.

SEV hevur viðgjørt báðar spurningarnar. Í løtuni er sjónarmiðið hjá SEV viðvíkjandi vindorkuútbygging, at fyri at stuðla undir virknari kapping sambært galdandi skipan, og sambært aðalendamálinum um, at prísurin á ravmagn ikki skal verða hægri enn neyðugt, eigur SEV sum útgangs-støði at luttaka í øllum vindorkuútboðum. Hóast SEV í aðramáta ynskir, at aktørarnir á økinum samstarva í mest møguligan mun, verður sum er

Vestmanna:
+298 34 68 00

Klaksvík:
+298 34 68 00

Vágur:
+298 34 68 00

ikki farið inn í samstarv við onnur privat vinnurekandi viðvíkjandi einum deildum ognarskapi í sambandi við vindorkuútbygging.

Viðmerkjast skal, at tað í fleiri ár ikki hevur borið til at fingið í lag eitt vanligt vindorkuútboð í Hoyvíkshaganum, eins og tað hevur staðið Vindrøkt og festaranum í Hoyvíkshaganum frítt at lata inn eina § 5, stk 3 umsókn viðvíkjandi útbygging av einari vindmyllulund í Hoyvíkshaganum til myndugleikan. SEV harmast stórliga, at eitt vindorkuútboð ikki langt síðani er framt í Hoyvíkshaganum soleiðis, at elskipanin bæði kundi verið munandi bíligari og grønari at rikið.

SEV vil við hesum enn einaferð loyva sær at heita á tykkum um at vera við til, at eitt vindorkuútboð við einari 18 MW vindmyllulund í Hoyvíkshaganum verður framt sum skjótast.

Vinalig heilsan
Elfelagið SEV

John Zachariassen, nevndarformaður / Hákun Djurhuus, stjóri